# Býráðið

**Dagfesting:** 30.01.2025 kl. 00:00
**Málnr.:** 25/00008

Nevndarlimir: Dávur Juul, Ólavur Larsen, Eyðun á Lakjuni, Eivin Breiðaskarð, Sonni á Horni, Jóan Pauli Olsen, Jastrid á Dalbø, Ørvar Jacobsen, Kristian Martin Petersen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 5/25 | 25/00022-2 | Broytingar í kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu |
| 6/25 | 25/00100-1 | Heimild at undirskriva keyp og sølu av fastari ogn, sambært §44, stk. 2 |
| 7/25 | 25/00062-1 | VW Crafter til Fuglafjarðar Havn Fyri afturlatnum hurðum |
| **Til kunning** | | |
| | | |

1

**Til støðutakan**

**5/25**
**25/00022-2 Broytingar í kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 16.01.2025 | 1/25 |
| 2 Sosiala nevnd | 21.01.2025 | 4/25 |
| 3 Býráðið | 30.01.2025 | 5/25 |



**Tilráðing**

| | |
|---|---|
| Til viðgerðar í | Býráðnum |
| Stutt lýsing av málinum | Nú nývalda býráðið fyri valskeiðið 2025-2028 hevur skipað seg er tørvur á ymiskum dagføringum í kommunustýrisskipanini.<br><br>Talan er um hesar tillagingar:<br>• §25 og §27 á síðu 7 og 8: Ungdómshúsið verður flutt frá Mentamálanevndini til Sosialu nevnd, har tað hevur verið síðani tilboðið var fyrireikað og stovnað. Eisini verður §25, 7. petti, sum umfatar frítíðarundirvísing og musikskúlaskipanina flutt frá Mentamálanevndini til Sosialu nevnd §27 8. petti, fyri at sleppa undan gegnistrupulleikum.<br>• §30 á síðu 9: Her var áður grein um skattakærunevnd, sum nú er avtikin. Í staðin er sett inn grein um Kambsdalsnevnd, sum politiskt ynski er um at seta á stovn.<br>• §32 á síðu 10: Her eru tillagingar gjørdar tí barnaverndarnevndin í seinastu býráðssetu varð broytt frá 4 til 5 limir eftir ynski frá Barnaverndarstovuni.<br>• §37 á síðu 11: Bygginevnd fyri barnaskúlan verður broytt til bygginevnd fyri 64-skúlan v.m.<br>• §38 á síðu 11: Nýggj grein sett inn við skipan av nevnd fyri Miðbýarætlanina.<br>• §38 á síðu 11 og 12: Gamla §38 Arbeiðs/hugskotsbólkur í samband við eldrabygging strikað.<br>• §39 á síðu 12: Arbeiðsbólkur í samband við bygginga av heilsumiðstøðini í FK-bygninginum strikaður tí byggingin er liðug. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Sambært § 5. í kommunustýrislógini skal kommunustýrið áseta nærri reglur um síni stýrisviðurskifti í eini kommunustýrisskipan. Uppskot og |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | broytingaruppskot til kommunustýrisskipan skulu hava tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. | | |
| Grundarlag | **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>• Kommunustýrislógin<br>**Møgulig fylgiskjøl**<br>• Kommunustýrisskipan Fuglafjørður við broytingum 06.01.2025 | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | n | n |
| | Umsitingarligar | n | n |
| Tilmæli | Kommunustjórin mælir til at býráðið viðgerð uppskotið til broytingar um neyðugt ger tillagingar og góðkennir broytingarnar við 1. viðgerð á býráðsfundinum 16. januar 2025.<br><br>**Tilmæli til 2. viðgerð 30. januar 2025**<br>Kommunustjórin mælir til at býráðið í fyrstu atløgu tekur støðu til uppskotið frá sosialu nevnd um §38.<br><br>Eisini mælir kommunustjórin til, at tað í §37 1. petti verður ásett at hinir 5 limirnir í 64-skúla bygginevndini vera leiðarin á teknisku deild, leiðarin á mentanardeildini, skúlastjórin í Fuglafjarðar skúla, formaðurin í skúlastýrinum fyri Fuglafjarðar skúla og ráðgevandi arkitekturin.<br><br>Ólavur Larsen skýtur upp, at tað í Kambsdalsnevndini verða valdir tríggjir Kambsdalsbúgvar og tveir býráðslimir og kommunustjórin er skrivari í nevndini.<br><br>Borgarstjórin mælir til, at Kambsdalsnevndin verður ein 5 mannað nevnd, sum skipar seg sjálv, har borgarstjórin er føddur limur, tríggjir Kambsdalsbúgvar og ein býráðslimur.<br><br>Býráðið tekur síðani endaliga støðu við 2. viðger til broytingarnar við ella uttan uppskotinum frá sosialu nevnd, Ólavi Larsen, borgarstjóranum og kommunustjóranum. | | |
| Dagf | 06.01.2025 | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Býráðið 16. januar 2025:**
Breið semja var um, at §38 Arbeiðs/hugskotsbólkur í samband við eldrabygging ikki eigur at verða strikað, men halda fram og tillaga orðing verður gjørd til aðru viðgerð. Jastrid á Dalbø spurdi um møgulleiki er, at annar limur enn borgarstjórin kann luttaka í Kambsdalsnevndini. Borgarstjórin mælir til at hetta verður tikið til viðgerðar við aðru viðgerð.

Málið varð sostatt einmælt samtykt at fara til aðru viðgerð.

**Sosiala nevnd 21. januar 2025:**
Sosiala nevnd mælir til at § 38 í Kommunufyriskipanini verður orða soleiðis:

**§ 38**
**Arbeiðs/hugskotsbólkur í sambandi við sosiala økið**

1. Arbeiðs/hugskotsbólkurin er mannaður av limunum í sosialu nevnd. Sosialdeildarleiðari er skrivari í bólkinum. Arbeiðsbólkurin kann víðkast við fakfólki eftir tørvi.

2. Arbeiðs/hugskotsbólkurin hevur vegna býráðið til endamáls at koma við hugskotum til útbyggingar og menning av tilboðunum innan sosiala økið.



**Býráðið 30. januar 2025:**
Fyrst varð atkvøtt um fakligu og fyrisitingarligu limirnar í bygginevndini fyri 64-skúlan sambært uppskotinum frá kommunustjóranum. Býráðið tók einmælt undir við hesum.

Síðani varð atkvøtt um uppskotið frá Sosialu nevnd. Býráðið tók einmælt undir við uppskotinum.

Síðani varð  atkvøtt um uppskotið frá Ólavi Larsen um Kambsdalsnevnd. Sonni á Horni, Ørvar Jacobsen, Jastrid á Dalbø og Ólavur Larsen atkvøddu fyri meðan Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Kristian Martin Petersen, Jóan Pauli Olsen og Eivin Breiðaskarð atkvøddu ímóti. Uppskotið fall sostatt.

Síðani varð atkvøtt um uppskotið frá borgarstjóranum. Sonni á Horni, Ørvar Jacobsen, Jastrid á Dalbø og Ólavur Larsen atkvøddu ímóti meðan Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Kristian Martin Petersen, Jóan Pauli Olsen og Eivin Breiðaskarð atkvøddu fyri. Uppskotið varð soleiðis samtykt.

Síðani varð atkvøtt við 2. viðgerð um broytingarnar í kommunustýrisskipanini við omanfyri samtyktu uppskotum. Sonni á Horni, Ørvar Jacobsen og Ólavur Larsen atkvøddu ímóti meðan Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Kristian Martin Petersen, Jóan Pauli Olsen og Eivin Breiðaskarð atkvøddu fyri. Jastrid á Dalbø atkvøddi blankt. Uppskotið varð soleiðis samtykt.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**6/25**

**25/00100-1 Heimild at undirskriva keyp og sølu av fastari ogn, sambært §44, stk. 2**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.01.2025 | 6/25 |

**Tilráðing**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
| Stutt lýsing av málinum | Sambært kommunustýrislógini § 44, stk. 2 skulu skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t. verða undirskrivað av borgarstjóranum og einum persóni, sum kommunustýrið hevur heimilað til tess. Í hesum førinum kann Fuglafjarðar býráð geva kommunustjóra, Jóanis Erik Køtlum, hesa heimild | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Málið verður viðgjørt við tí endamáli at býráðið formliga staðfestir heimildina, í samband við keyp og sølu af fastari ogn o.t., hjá kommunustjóranum. | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Kommunustýrislógin | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | n | n |
| | Umsitingarligar | n | n |
| Tilmæli | Borgarstjórin mælir til at geva kommunustjóranum hesa heimild. | | |
| Dagf | 30.01.2025 | | |

6

**Býráðið 30. januar 2025:**
Av tí at málið varð komið ov seint inn varð avgjørt at taka málið upp á eyka býráðsfundi.

Fundurin lokin kl. 20.45

Dávur Juul

Ólavur Larsen

Eyðun á Lakjuni

Eivin Breiðaskarð

Sonni á Horni

Jóan Pauli Olsen

Jastrid á Dalbø

Ørvar Jacobsen

Kristian Martin Petersen



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo